Eiler Jacobsen um norðhavssildina:

Hetta er ógvuliga spennandi

Nú Saksaberg hevur fingið sild á Sandoyarbankanum, og kanningar hjá Fiskirannsóknarstovuni vísa, at tveir triðingar av veiðini er hetlandssild og ein triðingur norðhavssild, er sildin aftur vorðin eitt spennandi um-røðuevnið hjá teimum, sum eru í hesi vinnu og hava áhuga fyri sildaspurninginum

SILDIN
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Serliga áhugavert er tað, at norðhavssild er at fáa á hesum leiðum hesa tíðina av árinum, sum annars hevur verið heilt óvanligt.

Enn eru menn varnir við at siga ov nógv, tí hetta er so nýtt, men røddir eru frammi um, at norðhavssildin kanska fer at taka uppaftur sítt gamla ferðamynstur. Um so verður, er eingin ivi um, at føroyingar

sum frá líður fara at standa nógv sterkari í samráðingunum um norðhavssildina.

Spennandi gongd

Eiler Jacobsen er ein teirra, sum hevur drúgvastu royndirnar, tá ið ræður um

– Eg kann ikki minnast, at norðhavssild nakrantíð áður er fingin á Suðuroyarbankanum hesa tíðina av árinum, sigur Eiler Jacobsen, sum hevur tosað við skiparan á Saksabergi av berum áhuga fyri hesum nýggja fyribrigdi

sildaveiði.

Hann heldur, at tey tekini, sum nú eru at hóma við sildini, eru ógvuliga áhugaverd og kunnu koma at fáa stóran týdning fyri føroysku nótavinnuna og føroyska samfelagið.

– Eg kann ikki minnast, at norðhavssild nakrantíð áður er fingin á Suðuroyarbankanum hesa tíðina av árinum, sigur Eiler Jacobsen, sum sjálvur hevur tosað við skiparan á Saksabergi av berum áhuga fyri hesum nýggja fyribrigdi.

Eiler sigur, at fyrst í nítiárunum, tá ið sild var at fáa á Sandoyarbankanum, hildu teir, at talan serliga var um hetlandssild, sum leitaði inn í føroyskan sjógv.

– Tað, eg kann minnast, fingu vit sild á hesum leiðum í mai, juni, juli og í august, men slett ikki so seint sum í hesum førinum.

Hann sigur, at tað, sum er mest spennandi við tí, sum nú hendir, er, at sild er at fáa á Sandoyarbankanum so seint um heystið - og ikki minst; at talan partvís er um norðhavssild.

Í 1966

Eiler sigur, at hann minnist aftur á árið 1966, tá ið teir sóu norðhavssild á Suðuroyarbankanum.

– Hetta var ikki um heystið, men um veturin, nevniliga í februar og mars – og kanska eisini í apríl mánaða hetta árið, heldur hann.

Hann heldur, at teir vóru teir fyrstu, sum bóru við sildina á Suðuroyarbankanum.

– Eg førdi Boðanes tá, sum var bygdur til kraftblokk og línufiskiskap. Í februar 1966 royndu vit við línu. Hvørt kvøld, tá ið vit settu, fingu vit stimar á ekkoloddið, og tað var so týðiligt, at hetta var sild.

Hann sigur, at teir árið eftir, tá ið teir høvdu fingið Ísborg, fóru beina leið á Suðuroyarbankan at vita, um sild stóð har suðuri.

– Eg minnist, at teir, sum vóru á brúnni, meðan eg var í koyggjuni á frívakt, sóu tveir stórar sildastimar, tá ið teir komu suður á bankan. Men hetta frætti eg ikki um, fyrr enn eg varð purraður út. Eg avgjørdi at venda aftur beinanvegin, men tá ið vit komu aftur á leiðina, var náttin liðin so nógv, at sildin stóð ikki so tætt longur. Vit kastaðu kortini og fingu sjey tons í hálið av stórari og góðari norðhavssild.

Eiler sigur, at hetta var 9. februar hetta árið, og honum kunnugt, er hetta fyrstu ferð, at norðhavssild er fingin á Suðuroyarbankanum hesa tíðina av árinum.

– Jú, eg haldi, at tað er ógvuliga spennandi, at Saksaberg nú hevur fingið sild aftur á Suðuroyarbankanum, og at ein triðingur av veiðini er norðhavssild. Sum sagt, veit eg ikki um, at hetta nakrantíð áður er hent hesa tíðina av árinum, sigur Eiler Jacobsen.

Eitt dagligt stríð fyri at fáa nýggja Smyril lidnan

– Tað eru ikki trupulleikar við stabilitetinum hjá nýggja Smyrli. Men sumt av handverkinum er Strandferðslan als ikki nøgd við. Skipasmiðjan hevur skyldu til at rætta mistøkini, men tað er eitt dagligt stríð at fáa tað gjørt

NÝGGI SMYRIL
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Tað er onki galið við stabilitetinum hjá nýggja Smyrli.

Tað staðfestir Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni.

Vit hava biðið hann um viðmerkingar til álvarsligu leysatíðindini, sum Finnur Helmsdal, løgtingsmaður nú vil hava í samferðslumálum at vátta ella avsanna.

Men hinvegin viðgongur stjórin, at Strandferðslan er ikki nøgt við alt handverkið umborð.

Men hann staðfestir samstundis, at eftir sáttmálanum, hevur skipasmiðjan skyldu til at rætta tey brek sum eru og Strandferðslan fer rætt og slætt ikki at taka ímóti skipinum, fyrrenn alt er, sum tað skal.

Eftir sáttmálanum, skal nýggi Smyril lúka øll tey krøv, sum eru sett fram í útbjóðingartilfarinum

Men tá ið tað kemur til trygd, tvs til stabilitet, brunatrygd o.s.fr., skal nýggi Smyril lúka allar altjóða reglar og allar danskar reglar.

– Tað er sostatt skipasmiðjan, sum hevur ábyrgdina av at byggja skipið so at tað lýkur øll krøv bæði frá Strandferðsluni og frá klassanum og fyrrenn alt er ílagi, kann Strandferðslan ikki taka ímóti skipinum.

– Og tað er samstundis uppgávan hjá Strandferðsluni at ansa eftir, at skipið lykur tey krøv, sum, sum stovnurin setir til byggingina.

Men tað er uppgávan hjá danska skipaeftirlitinum og klassanum at hava eftrirlit við, at skipið lýkur øll trygdarkrøvini, sum eru.

– Vit hava kravt, at skipið skal lúka danskar trygdarreglar, tí tær eru ímillum tær strangastu í heiminum.

Kristian Davidsen sigur eisini, at av tí sama, er tað púra vanlig mannagongd, at skipaeftirlitið fylgir við byggingini og góðkennir skipið heilt frá byrjan til enda og tí er onki lógir í, at skipaeftirlitið er uppií.

– Tað er rætt og slætt uppgávan hjá danska Skipaeftirlitinum at vera við í byggingini og eftirlitið fer sjálvsagt ikki at góðkenna eitt skip, sum hevur trupulleikar við stabilitetinum.

– Tá ið tað kemur til trygd og stabilitet, er tað danska skipaeftirlitið, sum er hægsti myndugleiki og síðani er tað klassin, sum er Lloyds í Keypmannahavn, og teir báðir stovnarnir skulu góðkenna alt, sum hevur við trygdina at gera, og teirra leiðbeiningum má skipasmiðjan rætta seg eftir og skipið skal handast Strandferðsluni við øllum góðkenningingum, sum hesir báðir stovnarnir krevja.

– Eg veit ikki, hvaðani leysasøgur um stabilitetin koma frá, men tað er altso als onki hald í teimum, staðfestir stjórin á Strandferðsluni.

Ónøgd við ávís viðurskifti

Fyri at fáa arbeiðið at byggja skipið at ganga væl, er umboð frá Strandferðslan altíð til taks hjá Skipasmiðjuni at spyrja, tá ið ivamál taka seg upp.

Uppgávan hjá Strandferðsluni er eisini at vísa á skeivleikar, sum verða gjørdir og at sýna arbeiðið, so hvørt, sum tað verður gjørt.

– Strandferðslan brúkar ikki orð sum "byggifusk" í sambandi við byggingina. Men tað er rætt, at tað eru ymisk viðurskifti, sum vit ikki eru nøgd við og sum skulu rættast, áðrenn vit taka ímóti skipinum.

– Og rørið, sum Finnur Helmsdal sipar til, at ferðafólk mugu gleiva uppum, veit Strandferðslan alt um.

– Talan er um eitt rør, sum er lagt skeivt og sum skipasmiðjan hevur játtað at leggja umaftur.

Stjórin á Strandferðsluni fer ikki í smálutir við tí, sum Strandferðslan er ónøgd við, men talan um ymisk brek sunt um í skipinum.

Men hann sigur, at fyri so vítt er onki forgjørt í hesum.

– Tá ið eitt skip verður bygt, sum er so stórt og framkomið, sum nýggi Smyril, henda altíð mistøk.

– Og tað eru ávís viðurskifti í sambandi við handverkið umborð á nýggja Smyrli, sum vit hava átalað skipasmiðjuna rættiliga rættiliga harðliga fyri og hava boðað frá, at skipið verður ikki góðtikið, fyrrenn viðurskiftini eru fingin í rættlag.

– Sumt av hesum er longu broytt, men onnur viðurskifti samráðast vit við skipasmiðjuna um.

Kortini viðgongur hann eisini, at tað hevur ikki altíð verið lætt at fingið skipasmiðjuna at góðtaka summi av mistøkunum.

– Brek skulu eisini valdast. Summi viðurskifti hava so stóran týdning, at har víkja vit ikki. So eru tað onnur viðurskifti, sum vit altíð kunnu samráðast um. Hetta er eisini so stórt skip, at Strandferðslan hevur heldur ikki kunna hugsað um allar smálutir og eisini í teimum førunum mugu vit samráðast við skipasmiðjuna um, hvussu trupulleikarnir verða loystir.

Ivingarsamt við tíðarætlanini

Hinvegin ásannar stjórin á Strandfersluni eisini, at tað er trupult at siga nakað um, nær nýggi Smyril verður liðugur.

– Seinastu tíðina hevur skipasmiðjan verið hart rakt av verkføllum, tí arbeiðsfólkið stúrdi fyri, at skipasmiðjan skuldi stongjast.

– Men í farnu viku varð greitt, at Skipasmiðjan stongir ikki!.

Og tað hjálpti beinanvegin upp á støðuna og síðani mánadagin hava tey arbeitt við fullari megi í tveimum vaktum, tvs, einar 16 tímar um dagin.

Strandfeðrslan metir, at frá tí, at arbeiðið verður tikið uppaftur av álvara, fer tað at taka fýra, fimm mánaðir at gera skipið liðugt.

Enn eru kortini ikki allar súður syftar, tí onkrar samráðingar skulu vera afturat ímillum arbeiðsfolkið og skipasmiðjuleiðsluna, so Strandferðaslan bíðar spent eftir teimum.

– Skipasmiðjan hevur boðað frá, at so leingi verkføllini hava herjað skipasmiðjuna, er tað ómøguligt at gera eina tíðarætlan.

– Men nú arbeiðið er tikið uppaftur, fara vit at krevja eina tíðarætlan frá skipasmiðjuni, sigur Kristian Davidsen.

– Tað var eitt tíðarskeið undir verkfallinum, har tað var trupult at koma á tal við skipasmiðjuna, men nú arbeiðið er tikið uppaftur, hava vit dagligt samband við skipasmiðjuna.

Hava trygd fyri pengunum

Stjórin á Strandferðsluni er eisini sannfordur um, at Strandferðslan er tryggjað so væl sum tað yvirhøvur er gjørligt at rokna við.

– Vit hava betalt næstan øll avdrøgini upp á skipið, men vit hava trygd fyri pengunum í einum stórum banka, sum er høgt í metum.

– Hendan bankatrygdin stendur við, til vit hava fingið skipið. Men gongur heilt galið, so at vit ikki fáa skipið, fáa vit peningin aftur.

Kristian Davidsen sigur, at sjálvur sáttmálin við IZAR skipasmiðjuna, gongur fram til 1. august næsta ár.

– Eftir tá hava vit rætt til at loysa okkum frá sáttmálanum og at krevja peningin aftur. Sostatt er tað ikki rætt at vit ikki eru tryggjað ímóti tapi aftaná 1. august. Kristian Davidsen endurtekur, at skipasmiðjan hevur bundið seg til at byggja eitt skip, sum lýkur tær treytir, sum Strandferðslan, danska Skipaeftirlitið og klassin seta.

– Klárar Skipasmiðjan ikki tað, hevur Strandferðslan heldur ikki skyldu til at taka ímóti skipinum og fær sostatt peningin aftur.

– So verður tað aftur ein samráðingarspurningur, hvat skal henda við við skipinum, men alt hetta eru hypoteskir spurningar, sum ongin kann siga nakað um enn.

Sjálvur er Strandferðslustjórin so sannfordur sum hann kann vera um, at Strandferðslan fær skipið.

– Spurningurin er bara akkurát, nær vit fáa tað

Hann ivast heldur ikki í, at vit fáa eitt skip, sum lýkur øll tey krøv, sum sett eru.

Tað hevur eisini ljóðað, at nýggi Smyril skal rulla so illa, men tað vísur Strandferðslan eisini aftur.

– Eg veit ikki um tað er hetta, sum Finnur Helmsdal hugsar um, tá ið hann stúrir fyri stabilitetinum.

– Men nýggi Smyril vísti seg at roynast sera væl, tá ið modelroyndir vórðu gjørdar, so eg eri sannfordur um, at tað verður eitt sera sjógott skip. Hann hevur eisini stabilisatorar, sum eru 10 fermetrar hvør, og tað er nógv. Teir eru eisini settir á skipssíðuna, har teir eru mest effektivir.

Samstundis sigur stjórin á Strandferðsluni, at í sáttmálanum er ein teknisk og fløkt skipan við bótum til skipasmiðjuna.

– Verður tíðarætlanin ikki hildin, fær skipasmiðjan dagbøtur. Siglur skipið ikki tey ásettu 21 mílini við 85% av maskinorkuni, fær Skipasmiðjan eisinni bót. Siglur skipið t.d. 20,8 míl, fær skipasmiðjann bót. Og ferð ferðin niður um 20 míl, kann Strandferðslan loysa seg frá sáttmálanum

– Er skipið tyngri enn ásett er, og sostatt kemur at brúka meiri olju, fær Skipasmiðjan eisini bót o.sfr.

– Sostatt er ógvuliga nógv gjørt fyri, at skipið lýkur ásettu krøvini, bæði við bótum og við tí eftirlitið, sum er hvønn dag, sigur Kristian Davidsen.

Kann tað henda, at alt fer fyri bakka?

– Í teori er sjálvandi alt møguligt. Men eg ivist ikki í, at spaniólar eru sinnaðir at halda sáttmálan undir øllum umstøðum, tí klára teir tað ikki, er tað ikki gott fyri teir. Sjálvandi ger spanska skipasmiðjan ikki ein sáttmála, sum hon ikki ætlar at gera alt fyri at halda.

Hinvegin taka vit tey mistøk, sum eru gjørd í størsta álvara og tey skulu rættast, áðrenn vit góðtaka skipið og vilja taka ímóti tí. Og vit mugu eisini viðganga, at í summum førum stendur nógv á at fáa Skipasmiðjuna at rætta brekini.Tað er eitt dagligt stríð við Skipasmiðjuna, men vit krevja, at tað skal gerast, tí vit vilja ikki taka ímóti einum skipi ið ikki er tað, vit hava biðið um og goldið fyri.

– Tað er eitt dagligt stríð at fáa skipasmiðjuna at rætta brekini sum eru, men vit vænta, at hon fer at halda sáttmálan, siga Kristian Davidsen og Magnus Magnussen

Finnur Helmsdal vil hava greiði á leysasøgum um nýggja Smyril

Finnur Helmsdal, løgtingsmaður, hevur frætt at umfatandi byggifusk er staðfest í nýggja Smyrli og hann hevur eisini frætt, at stabiliteturin er ikki ílagi. Nú vil hann hava landsstýrismannin at greiða løgtinginum frá støðuni

NÝGGI SMYRIL
Aki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

– Tá ið nýggi Smyril kemur, verður neyðugt hjá ferðafólki at gleiva upp um rør og annað fyri at koma vegin fram umborð.

Hetta er ein leysasøga, sum Finnur Helmsdal, løgtingsmaður, hevur hoyrt um byggingina av nýggja suðuroyarskipinum.

Men løgtingsmaðurin hevur hoyrt nógv meiri enn tað og tí hevur hann nú reist málið í ringinum.

Hann vil sostatt hava landsstýrismannin í samferðslumálum, Jógvan við Keldu, at greiða løgtinginum frá, hvussu tað gongur við byggingini.

Tí hevur hann nú sett landsstýrismanninum seks spurningar um nýggja Smyril.

Spurningarnir eru hesir:

1. Er tað rætt, at víttfevnandi byggifusk er staðfest viðvíkjandi byggingini av suðuroyarskipinum?
2. Er tað rætt, at trupulleikar eru staðfestir viðvíkjandi stabiliteinum á nýbygningininum?
3. Er tað rætt, at danska sjófartsstýrið er komið uppí, og at tað hevur virknan leiklut í málinum?
4. Er tað rætt, at byggingin av suðuroyarskipinum ikki hevur nakra fasta tíðarætlan longur, og at eingin rættiliga veit, hvat fer at henda og nær?
5. Er tað rætt, at Føroya landsstýri ikki er tryggjað móti tapi í samband við skipsbyggingina longur enn til august 2005, og at landsstýrið ikki veit sær nakra trygd eftir ta tíð?
6. Um tað hendir, at spanska skipasmiðjan blakar frá sær, er tað tá burtur við at tosa um, at suðuroyarskipið verður liðugtgjørt í Føroyum?

– Vónandi fáa vit eitt svar so vit kunnu draga andan lættari, sigur Finnur Helmsdal

Finnur harmast og ræðist

Finnur Helmsdal leggur dent á, at hann reisir ikki málið fyri at seta byggingina av suðuroyarskipinum í ringt ljós.

– Heldur verður fyrispurningurin settur av ampa og áhuga. Eg var sjálvur við til at játta 300 milliónir til nýtt suðuroyarskip, tí tað var bráðneyðugt at gera nakað við samskiftið við Suðuroynna.

– Tí bæði harmar og ræðir tað meg at hoyra, at øll verkætlanin kanska er um at fara fyri bakka.

Finnur Helmsdal sigur, at sjálvandi er tað ein vanlukka, um 300 milliónir krónur fara fyri skeyti.

Men hann heldur kortini, at vanlukkan er kanska størri fyri Suðuroynna og tað fólk og virksemi, sum har er.

Hann sigur, at eftir tí ið frættist, hevur Strandferðslan so at siga einki samband við sponsku skipasmiðjuna í løtuni, tí at alt er ein hurlivasi harniðri.

Sostatt dugir Strandfersðlan ikki rættiliga at siga nakað ítøkiligt um støðuna.

– Tíðarætlanin er ikki hildin, og tað frættist, at Strandferðslan hevur ikki ánilsi av, um nøkur tíðarætlan yvirhøvur er galdandi longur, sigur Finnur Helmsdal.

Hann leggur afturat, at tað skilst, at alt viðvíkjandi byggingini av suðuroyarskipinum er tryggjað til í august 2005.

– Nú eingin tíðarætlan tykist vera galdandi,og eingin veit nakað nakað um støðuna, er spurningurin, um trygdin fyri peningi og skipi eisini er komin í tungan sjógv og um trygdin viðvíkjandi sáttmálum og trygd ikki røkkur longri enn til í august 2005?

– Vónandi kann landsstýrismaðurin svara hesum fyrispurningi soleiðis, at eg og allir aðrir føroyingar kenna ein lætta og samstundis kunnu gleða okkum til tann dag, tá nýggja suðuroyarskipið kemur snøgt og stásiligt inn á Trongisvágsfjørð, sigur Finnur Helmsdal.

Ein kunngerð bjóðar vetrinum vælkomnum

Í nátt skal klokkan flytast ein tíma aftur

Snorri Brend

Heystið er yvir okkum, kuldin merkist í luftini, og veturin er í náND. Kortini er tað fyrst í nátt at veturin í veruleikanum er av: Í nátt verður klokkan nevniliga flutt aftur.

Hetta verður gjørt eftir eini kunngerð frá 8. oktober 2001 um summartíð. Her verður sagt, at serstøk tíðarrokning fyri 2004, altso summartíðin, er galdandi í tíðarskeiðnum frá 28. Mars og fram til 31. Oktober, sum altso er í dag.

Hetta merkir so, at klokkan 02.00 í nátt skal klokkan flytast ein tíma fram til kl. 01.00. Við hesi flyting er vanlig tíð, ella vetrartíðin, formliga komin í gildi.

Sigast skal tó, at tað ikki er neyðugt at sita uppi og bíða til kl. 02.00. Hevur tú hug at gera tað fyrri um kvøldið, er einki til hindurs fyri tí!